

# Roknskapargreining

## Gjøgnumgongd av útvaldum roknskapartølum hjá størru fyritøkunum í Føroyum

Januar

September 2023

# Lýsing av greiningini

Januar hevur gjørt eina roknskapargreining av teimum størstu fyritøkunum í Føroyum við støði í teirra almennu roknskapunum. Hetta er sætta greining av sínum slag frá P/F Januar.

Tey feløgini, ið eru við í greiningini, eru feløg, sum hava ein roknskap í flokki C-stór ella størri. Í mun til undanfarna ár, er KJ Hydraulik komi við í greiningina sum í 2022 fyri fyrstu ferð legði fram roknskapin eftir roknskaparflokki fyri C-stórt felag.

| Roknskapartøl fyri árini | Viðkomandi lyklatøl |
|---|---|
| 2018-2022 | Nettosøla<br>EBIT<br>EBIT Margin<br>Íløgur<br>nettoskuld |

## Íroknað feløg í greiningini

# Grundarlag og avmarkingar

## Allýsing av roknskaparflokki C-stór

Grundarlagið fyri roknskapargreiningini er øll føroysku feløgini sum gera roknskapin í samsvari við ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki C-Stór ella sum eru skrásett á keypsskálanum.

Eitt felag verður flokkað sum C-stórt, um felagið í tvey fylgjandi ár er omanfyri tveimum av fyritreytunum niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Fíggjarjavnin er størri enn: | 143 mió. kr. |
| Nettoumsetningurin er størri enn: | 286 mió. kr. |
| Miðal starvsfólkatalið, er størri enn: | 250 ársverk |

## Avmarkingar

Roknskapargreiningin gevur eina lýsing av gongdini hjá teimum størstu fyritøkunum í Føroyum fyri árini 2018-2022. Vavið á greiningini er tó avmarkað til, ikki at umfatað fíggjarfyritøkur, íroknað peningastovnar, íløgufeløg, eftirlønarfeløg ella tryggingarfeløg. Harumframt er Bakkafrost ikki tikið við í greiningina.

### Fíggjarfyritøkur

Fíggjarligar fyritøkur leggja roknskapin fram eftir serstøkum leisti. Hetta avmarkar samanbæri við aðrar fyritøkur og eru fíggjarligu fyritøkurnar tískil ikki tiknar við í greiningina.

### Bakkafrost

Bakkafrost verður mett at vera so mikið stórt, at tað vildi skeikla samlaðu myndina av gongdini hjá teimum stóru feløgunum, tvørtur um vinnugreinar, um roknskapartølini hjá Bakkafrost vóru tikin við í greiningina.

# Samandráttur 2018-2022

Samanumtikið hevur 2022 verið eitt gott ár fyri samlaðu vinnuna við vaksandi sølu, størri íløgum, fleiri starvsfólkum størri ársúrsliti. Talvan niðanfyri vísir ein samandrátt av gongdini seinastu fimm árini hjá fyritøkunum, sum eru tiknar við í greiningina.

| Lyklatøl | Eind | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Broyting í nettosøla | % | 28,3 | 12,7 | -8,3 | 8,0 | 4,1 |
| Nettosøla | mia.kr. | 14,9 | 11,6 | 10,3 | 11,2 | 10,4 |
| Broyting í nettosølu | Vísital (2018 = 100) | 143 | 112 | 99 | 108 | 100 |
| EBIT – avkast | % | 9,3 | 9,0 | 6,2 | 9,8 | 10,4 |
| Íløgur | mia.kr | 1,9 | 1,3 | 1,4 | 1,5 | 1,6 |
| Rentuberandi skuld | mia.kr | 5,4 | 5,4 | 5,0 | 4,8 | 4,7 |
| Eginognarpartur | % | 47,5 | 49,8 | 51,2 | 52,1 | 48,4 |
| Ársverk | tal | 3.926 | 3.742 | 3.647 | 3.612 | 3.410 |
| Umsetningur pr. ársverk | mió.kr | 3,8 | 3,1 | 2,8 | 3,1 | 3,0 |
| Ársúrslit | mió.kr. | 1.142 | 845 | 414 | 907 | 897 |
| Vinningsbýti | mió.kr. | 385 | 408 | 198 | 223 | 364 |



# Útvaldar broytingar 2021-2022

Av roknaðu lyklatølunum og gongdini hjá feløgunum hava vit greinað fýra av lyklatølunum nærri. Hetta eru lyklatøl sum í størri mun eru broytt frá 2021 til 2022 ella sum í aðrar mátar kunnu verða viðkomandi at lýsa í greiningini.

## Nettosøla

**+28,3%**

Samlaða nettosølan er økt við +28,3% sammett við undanfarna ár. Nærum øll feløgini høvdu eina øking í nettoumsetninginum, harav 10 teirra høvdu ein vøkstur omanfyri 20%.

## EBIT

**+0,3%**

EBIT avkastið hækkar við 0,3% - síðani 2020 hevur EBIT avkastið verið spakuliga hækkandi, tó er tendensurin enn negativur, samanborið við 2018 tá EBIT avkastið varð 10,4%, so er EBIT avkastið nú 9,3% í 2022.

## Íløgur

**+52,3%**

Íløgurnar hjá teimum størru feløgunum eru øktar við 52,3% samanborið við seinasta ár, og er hetta fyrsta árið í greiningini, har íløgurnar eru hægri enn árið fyri.

## Nettoskuld

**+0,7%**

Nettoskuldin hjá teimum stóru feløgunum er økt við 0,7% í 2022 (2021: 7,9%). Nettoskuldin tykist at hava javnað seg í árinum við 5,4 mia.kr.

Nettosølan er økt 28,3% í mun til undanfarna ár, ið samstundis er størsti vøksturin staðfestur hesi árini, ið greiningin er gjørd. Orsøkirnar til vøksturin eru fleiri, eitt nú ein hægri oljuprísur samanborið við undanfarin ár.

Íløgurnar eru øktar við 52,3%, samtíðis sum nettoskuldin stendur í stað (+0,7%). Hetta er tekin um, at fyritøkurnar í ávísan mun hava eginfíggjað íløgurnar, heldur enn at upptaka fígging.

# Stór øking í nettosøluni fyri 2022

Við undantaki av einari fyritøku, so hava allar fyritøkurnar í greiningini eina øking í nettosøluni. Samlaða nettosølan hækkaði við 28,3% í mun til undanfarna ár (2021: +12,7%), svarandi til eina øking upp á 3,3 mia.kr.

Tann samlaða nettosølan fyri 2022 er 14,9 mia.kr. (2021: 11,6 mia.kr.)

Fyri roknskaparárið 2020 síggjast avleiðingarnar av Covid-19 farsóttini týðliga aftur.




*Høgu oljuprísirnir í 2022 hava eina týðandi ávirkan á samlaða nettoumsetningin.*

# Lutfalsligur partur av vøkstrinum í nettoumsetninginum

Hóast samlaði nettoumsetningurin er vaksin við 3,3 mia.kr. frá 2021 til 2022, er býtið av av vøkstrinum ikki javnt býtt millum allar fyritøkurnar í greiningini.

Foss diagrammið niðanfyri vísir á, í hvønn mun einstøku fyritøkurnar standa fyri vøkstrinum í nettoumsetninginum. Vit hava tó flokkað fyritøkurnar, sum ikki hava ein vøkstur á 5% ella meira undir einum. Hetta eru 13 fyritøkur, sum í miðal hava ein vøkstur á 1,69%.




*2 av feløgunum standa fyri 40,5% av samlaða vøkstrinum í nettoumsetninginum í 2022.*

## EBIT er hækkandi

Samlaða EBIT, sum vísur rakstrarúrslitið áðrenn fíggjarligar inntøkur, -kostnaðir og áðrenn skatt, er vaksið til 1,4 mia.kr. í 2022 sammett við 1,0 mia.kr. í 2021. Hetta svarar til ein vøkstur á 33,7% (2021: 63,7%). Eins og samlaða sølan var lægri í 2020 undir COVID-19 farsóttini, sæst ávirkanin av farsóttini á sama hátt aftur í EBIT.




## Miðal EBIT-avkastið liggur á sama støðið

Miðal EBIT-avkastið liggur á 9,3% (2021: 9,0%). Hóast hetta, hevur gongdin á miðal EBIT-avkastinum verið lækkandi seinastu 5 árini, sum reyða strikan yvir rákið vísir.



# Gongdin í EBIT og nettosølu

Samlaða EBIT liggur á sama støði sum undanfarna ár. Hóast samlaða gongdin er óbroytt, hava nakrar av fyritøkunum eina øking í EBIT og aðrar eina lækking í EBIT. Niðanfyri verður víst hvørjar tríggjar fyritøkur hava bestu framgongd í EBIT-avkastinum (*EBIT / Nettoumsetning*) umframt at ein samanteljing verður gjørd av fyritøkunum og gongd teirra frá 2021 til 2022 í mun til øking ella lækking í nettoumsetninginum og EBIT-avkastinum.

### Topp 3 framgongd í EBIT avkasti

Fyritøkurnar við bestu framgongd í EBIT-avkastinum eru alifyritøkurnar við ávikavist 10,3% og 10,0% og ein fyritøka innan vinnuligan fiskiskap við 6,4%.




### EBIT-Avkast samanhildið við nettosølu

Undantikið eitt felag, hava allar fyritøkurnar framgongd í nettoumsetninginum. Av teimum 20 fyritøkunum við øking í nettoumsetningini hava 10 ein vøkstur og 10 eina lækking í EBIT-avkastinum.

Ein fyritøka hevur eina afturgongd í bæði nettoumsetningi og EBIT-avkasti.



# Stórar íløgur í 2022

+52,3%

**Samlaðu íløgurnar eru hækkaðar samanborið við undanfarna ár.**

Seinnu árini hava samlaðu íløgurnar verið minkandi á hvørjum ári, men í 2022 broytist gongdin við øktum íløgum

*3 av feløgunum standa fyri 47,9% av samlaðu íløgunum í 2022.*

# Íløgurnar seinastu árini

Tær stóru fyritøkurnar hava gjørt íløgur fyri gott 1,9 mia.kr. í 2022 sammett við 1,26 mia.kr. í 2021. Íløgurnar í 2022 sum eru 656 mió.kr. hægri enn undanfarna ár, eru eisini tær hægstu tað seinasta 5 ára tíðarskeiðið.




15 av fyritøkunum hava gjørt størri íløgur í 2022 samanborið við undanfarna, tá 10 fyritøkur høvdu eina øking í íløgunum.



# Rentuberandi nettoskuld

Samlaða nettoskuldin hjá fyritøkunum er 5,41 mia.kr. við ársenda 2022 samanborið við 5,38 mia.kr. við ársenda 2021, ið svarar til ein øking á 35,6 mió.kr. ella +0,7%.




Niðanfyri er ein samanbering av árligu íløgunum og broytingini í rentuberandi nettoskuldini. Sammett við íløgurnar, sum eru øktar nógv í 2022 nógv, er skuldin ikki broytt samsvarandi. Hetta merkir, at íløgurnar í 2022 í stóran mun eru eginfíggjaðar.



Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Set tykkum í samband við okkum og fá eitt innleiðandi og óheft prát um tykkara avbjóðingar og ivamál.

Vit veita ráðgeving við serkunnleika innan hesi øki:

- Grannskoðan
- Bókhald
- Skattur
- Burðardygd
- KT-trygd
- Dátuvernd
- Onnur virkisráðgeving



# Fyrivarni

## Fyrivarni

*Greiningin er bert ætlað sum ein almenn kunning um viðurskifti, ið kunnu hava áhuga og skal ikki metast sum ráðgeving. Tú eigur ikki at handla út frá upplýsingum, sum eru í greiningini uttan aðra ráðgeving. Vit lata onga váttan ella vissu um rættleikan ella fullkomileikan av upplýsingum, ið eru tiknar við í hesi greiningini.*


**P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**

Óðinshædd 13
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn

+298 31 47 00

JANUAR@JANUAR.FO
WWW.JANUAR.FO